# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

*30. januar fingu Regina Midjord og Janus Mohr Kjærbo eina dóttur. Her er stórasystir Lea, 5 ár, saman við lítlu didduni, ið vigaði 4050 gr. og var 55 cm. long.*



31. januar fingu Poula Eydis Ennigarð og Trøndur Lauritsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3495 gr.

2. februar fingu Amy og Jógvan Ljóheim, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

3. februar fingu Anna Jensen og Dánjal Jákup Berg, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

4. februar fingu Ada Kristina Petersen og Jóhan Falkvard Clementsen, Sandur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3550 gr.

4. februar fingu Halldis Hansen, Nólsoy og Hjørleif Rein, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3400 gr.

5. februar fingu Jónfríð Lassen og Súni Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3200 gr.

6. februar fingu Joan og Árni Østerø, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4200 gr.

7. februar fingu Jóhanna Debes, Oyri og Alberg Gaardlykke, Nes, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

7. februar fingu Thurid í Buð og Atli S. Justinussen, Árnafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4250 gr.

7. februar fingu Margreta R. Dam og Poul M. Dam, Øravíkarlíð, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3400 gr.

8. februar fingu Ruth og Sigtór Heinesen, Hoyvík, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4550 gr.

8. februar fingu Lív Petersen, Tórshavn og Benny Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

9. februar fingu Erla og Ingi á Smið, Kaldbak, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

## Hann gjørdi sunnudagsskúlan og møtini livandi

Í fagrast hugsandi veðri fylgdu okur Teddy seinastu ferðina út gjøgnum miðbýin. Grípandi var, millum lokalar suðringar, at møta mongum, nú búsettir norðanfjørs, hvørs fyrsti andaligi spíri búnaðist í Salem undir kønu hond hansara. Teir komu suður hendan vakra vetrardagin, fyri í takksemi at minnast Teddy.

Sjálvt sólin vildi verða við og sendi sínar lívgevandi og vónríku geislar heilt at grøvini.

Ímyndi mær Teddy hesa løtuna, hvussu hann saman við Jesusi fylgdi við okun, úr tí dýrdar-staði, hann so mangan myndaði so ljóslivandi fyri okun.



*Teddy Michelsen*

Av sonnum ein stórbær løta, har okur mintust vinin og bróðurin og hoyrdu frá lívi hansara saman við Jesusi. Knappliga 50 ár vóru liðin, frá tí løtu hann legði hond sína í tær naglamerktu, sum um miðju nátt leygarkvøldið leiddu hann inn í teir ævigu bústaðir. Og har fara okur skjótt at møta teimum - Jesusi, Teddy og so mongum øðrum.

Hvat vildi tú sagt um Teddy?- hendan spurningin fekk je settan umborð á Smyrli á veg suður til jarðarfeðina. Svarið var lætt: Teddy gjørdi sunnudagsskúlan og møtini livandi og spennandi, gjørdi at je sum barn og ungur gleddi meg at fara hagar.

Jesus var høvuðsevni í frásagnum og talum hansara. Eins og Mel Gibson í filminum "The passion of the Christ", megnaði Teddy at mála Frelsaran fyri okun á slíkan hátt, at okur valdu at elska og fylgja í fótasporum Frelsarans. Soleiðis var hann við til at bjarga mongum , sum í dag virka á sama øki sum hann, kunngera boðskapin um Jesus

Júst hetta verður so væl lýst fyri okun í bókini "tað hendi umborð 2", har greitt verður frá umvending umborð á Sólborg. Teddy var við henda túrin, og úr bókini, sum Svenning av Lofti hevur skrivað, lesa okur:

"har sum Teddy var, varð tosað um Jesus, bæði tá ið teir sótu í messuni ella vóru í tí dagliga arbeiðinum"

Trupuleikin hjá hesum ófrelsta umborð á Sólborg var, at hann royndi at betra seg sjálvan til frelsu, men boðini frá Teddy vóru greið:"nei, góði, tú kemur ikki til Himmals á handan hátt!" Og við at vísa honum á Jesus, sum hin goða hirðan, var Teddy við til at leiða hann seinastu fetini til Krossin, har tær naglamerktu hendurnar tóku móti enn einum burturvilstum barni.

Gott verður at møta Teddy aftur - heima hjá Jesusi. Inntil tá gleðast okur, ikki sum tey, ið onga vón hava, men sum tey, ið bíða við gleði eftir tí degi, tá okur skulu flyta inn í tað veruliga lívið.

**Jenis**

## Anna Kirstin Thomsen 60 ár

Leygardagin 11. februar fyllir Anna Kirstin Thomsen á Tvøroyri 60 ár.

Anna Kirstin er ikki hvør sum helst. Hon man verða eitt tað besta umboðið, Tvøroyri eigur úteftir. Hon er er lívlig, stuttlig og hugnalig at vera saman við. Altíð í góðum lag og full av energi. Dugir væl at standa fyri og er ein framúr góður konferencier.

Hon ger nógv burturúr dansi og hevur í mong ár skipað fyri skeiðum í t.d. Rock & Roll og standard dansi kring landið. Eisini er hon virkin í Tvøroyrar Hornorkestri, har hon spælir trombon og var kassameistari í mong ár. Hon er sera góð við kriatúr, hevur seyð, sum hon sjálv passar. Hvør seyður hevur sítt egna navn. Eisini hevur hon kettur og hønur.



Í nøkur ár var Anna Kirstin læknaskrivari. Annars hevur hon arbeitt í familjufyritøkuni T. F. Thomsen, í gamla kongiliga handlinum á Tvøroyri, og tá handilin herfyri lat aftur, gjørdi hon hølini um til „Kongiligu Pubbina", sum hon rekur. Dagliga arbeiðir hon eisini hálva tíð á Shellavgreiðskuni hjá T. F. Thomsen.

Foreldur hennara vóru: Ninna, f. Nielsen, úr Havn, og Gunnar Thomsen, ið var sonur Thomas Thomsen á Tvøroyri. Anna Kirstin eigur tveir beiggjar: Thomas, ið er stjóri í fyritøkuni T.F. Thomsen, og Bjarni, ið býr í Danmark.

Anna Kirstin er gift Knud Steinø, skurðlækna á Tvøroyrar Sjúkrahúsi, ættaður úr Keypmannahavn. Tey eiga tvær døtur, Ninna og Turið Maria, og fimm barnabørn. Ninna býr í Svøríki, har hon hevur mann og trý børn, og Turið Maria býr í Keypmannhavn, har hon hevur mann og tvey børn.

Føðingardagurin verður hildin í Høllini í Trongisvági fyri innbodnum.



Les Sosialin so ert tú við



Sig tína meining í Sosialinum